# Prixið lendi bleytt og v



**Fangandi popptónleikur frá Eyðuni Nolsøe og Lawetz sigraði í triðja umfarinum av Prix Føroyum. Hetta umfarið hevði meira hitt-potentiali enn bæði tey undanfarnu umførini tilsamans – og hvør segði, at Prixið var ferdigt sum poppsangari**

3. UMFAR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Eftir bleiktrandi ljós, rungandi tónar, myrkar akkordir, svingandi blásarar og avbjóðandi tónleik var tað hesaferð poppurin – tann melodiøsi og fangandi – sum sigraði.

Eyðun Nolsøe, Lawetz og Rok høvdu meira hit-potentiali við sínum løgum – og tá verður tosað um popptónleik til føroyingar – enn allir hinir bólkarnir í ársins Prixi higartil hava havt.

Fleiri av løgunum vóru frálík, og hóast Rok ikki megnaði at koma víðari frá hesum umfarinum, høvdu Signar í Homrum og hansara menn smíða nakrar fínar sangir, sum fangaðu beinanvegin. Eyðun Nolsøe vísti enn einferð dygd í sínum sangum, og hjá Lawetz var tað ein festlig blanding av góðum sangum og nógvari orku, sum tryggjaði teimum víðari luttøku í kappingini.

Hinir tríggir bólkarnir gjørdu eisini vart við seg á hvør sín hátt. Direct Level hevði tikið seg munandi fram síðani GospelPrixið, tá ið teir gjørdust nummar 2, Frostbit var nýtt og spennandi, meðan India, sum legði fyri, ikki kláraði at blanda seg upp í kappingina við hinar bólkarnar.

## Lawetz svingaði

Væl mannaði poppbólkurin Lawetz var longu fyri tveimum árum síðani eitt nýtt og frískt ískoyti til kappingina, og hóast nógv tá varð gjørt burtur úr, at rockbólkurin Krit mátti lúta fyri eitt nú Lawetz, prógvaði bólkurin sítt virði í hálvfinaluni.

Hóast fólk høvdu havt møguleikan at hoyra Lawetz áður, so vóru teir aftur hesaferð frískir og frekir soleiðs mitt í tí heila. Eftir meira vanligan popp og rocktónleik frá trimum bólkum frammanundan blástu teir salin um koll við sínum leikandi lætta tónleiki, og tað var næstan sum at vakna í onkrum sólføgrum suðurlandi, tá ið Lawetz setti sólsellurnar til.

Blásararnir Dávur Juul Magnussen og Tróndur Olsen vóru ikki sentralir á pallinum, men teir vóru avgerandi fyri ljóðið og ljóðmyndina, sum lyfti seg upp um teir flestu av hinum bólkunum.

Høgni Reistrup gekk á odda við sínari eyðkendu rødd, og tónleikurin var lagdur í tryggar karmar av einum bólki, sum spældi væl – og saman.

## Spennandi gospel

Tað var annars bólkurin India, sum hevði fingið kjansin at leggja fyri í Prixnum hesaferð. Bólkurin var komin við orsaka av avboði frá einum øðrum bólki, og tey høvdu havt stutta tíð at venja í, eftir at tey fingu boð til Prixið.

Bólkurin spældi myrkan rocktónleik, sum kendist nakað einstáttaður og uttan tað orkuna ella handverkið, sum skuldi til fyri at blanda seg upp í kappingina av álvara.

Hinvegin var meira flog yvir gospelbólkinum Direct Level, sum við einum góðum sangara á odda megnaði at lata áhoyrarunum eina góða framførslu við melodiøsum rocktónleiki. Føroyskur gospeltónleikur er ikki júst tað, sum hann plagdi at vera, og Direct Level gav eitt gott boð upp á, hvagar føroyskur gospeltónleikur kann fara við góum tónleikaligum hugflogi og dygd.

Direct Level var ein av bólkunum, sum var við í tí sonevnda GospelPrixnum á sinni, og tá endaðu teir sum nummar 2 aftanfyri bólkin I Am. Tað er runnið nógv vatn í ánni síðani tá, og Direct Level er ein enn meira spennandi og lovandi bólkur, enn hann var tá – eisini hóast teir verða ikki verða mintir so leingi fyri royndina at rappa.

## Popprok

Bólkurin Rok, sum var mannaður við royndum tónleikarum, var við í Prixnum fyri fyrstu ferð leygarkvøldið, og tað var ein byrjan, sum vónandi fer at hava meira við sær – um ikki í Prixnum hesaferð, so í øllum førum við fleiri framførslum og eini møguligari útgávu.

Ein av tónleikarunum í Rok er Signar í Homrum, sum var sangari í bólkinum Kjølar, sum var nógv frammi eitt skifti í 90'unum. Teir vóru kendir fyri at spæla og gera góðan rocktónleik, og tað hoyrdist aftur í Rok, at har var okkurt samband til Kjølar. Tað hoyrdist eisini okkurt fjart ekkó av Mark No Limits, har gittarspælarin í Rok, Johan Ziskason, plagdi at spæla.

Rok hevði fýra frálíkar poppsangir á skánni. Løgini vóru góð og fangaðu beinanvegin. Tað var ikki nakað nýskapandi yvir tí, eingin loyndarfull leitan eftir nýggjum tónum ella stemningum, men ein trygg framførsla við góðum løgum og niðurløgum. Til dømis kundi sangurin »Alt sum eg geri« saktans blivið eitt hitt í Føroyum. Sangurin sleppur nú at royna seg á 15 teimum bestu, og hvør veit, um hann ikki verður meira at hoyra á útvarpsrásunum hereftir.

Tað gjørdist ikki pláss fyri Rok í hálvfinaluni, men vónandi verður meira rok á skránni komandi tíðina – bólkurin eigur í øllum førum góðan tónleik at bjóða.

## Sálmur við frostbiti

Móti endanum av kappingini skuldi tann nýggi bólkurin Frostbit royna at gera vart við seg millum Lawetz og favorittin Eyðun Nolsøe. Frostbit legði seg meira á tann tunga bógvin, og í løtum ljóðaði rocktónleikurin hjá teimum spennandi. Tað er kanska ikki longur nøkur orginal idé at brúka ein gamlan sálm í tónleikinum, men tað riggaði fínt.

Øll framførslan var ikki líka sannførandi, men Frostbit var avgjørt eitt nýtt



*Bólkurin India slapp at seta hol á eitt gott og undirhaldandi Prix-kvøld*

*Mynd: Jens Kr. Vang*